

*Jaguar Advanced Lightweight Coupé kemur á marknaðin í 2006 við aluminiumskarossarí og bygdur á aluminiumschassis*






Jaguar Advanced Lightweight Coupé:

# Sportscoupé við stórari baklúku

**Jaguar Advanced Lightweight Coupé er ein elegantur sportsbilur í røttum Jaguar stíli. Bilurin, ið er gjørdur úr aluminium og skal avloysa XK8, kemur á marknaðin í 2006**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Bilurin hevur stóra baklúku lutfalsliga stórt viðførisrúm*



*Kabinan er framúr væl innrættað, alt er gjørt úr leður og aluminium. Elegant og smart*

Jaguar kal la konseptbilin Advanced Lightweight Coupé, men eingin ivi er, um at talan er um avloysaran fyri Jaguar XK8.

Ein Jaguar skal útstrála orku og síggja sportsligur út, samstundis sum bilurin skal vera elegantur í allar mátar.

Ætlanin er at hesin bilurin skal koma á marknaðin í 2006 við aluminiumskarossarí og bygdur á aluminiumschassis.

Motorurin verður 4,2 litur V8 við 295 hk og eini kompressaraløddari útgávu við 392 hk, ið koyrir frá 0-100 km/t upp á undir 5 sekund.

Advanced Lightweight Coupé er ein 2+2 við framúr væl innrættaðari kabinu, har alt er gjørt úr leður og aluminium, og øll instrumentini eru savnaði mitt framman fyri føraran.

Bilurin hevur stóra baklúku og lutfalsliga stórt viðførisrúm

Í dag kostar ein Jaguar XK8 við 298 hk umleið 1,7 milliónir krónur í Danmark.

# Honda robottur í Evropa-parlamentinum

**Heimsins mest framkomni "humanoidi" robottur, Asimo, heilsaði herfyri upp á limirnar í Evropa-parlamentinum, fyri at vísa hvat vit kunnu vænta okkum innan elekronisku tøknina í framtíðini**

ROBOTTUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Asimo, framkomni robotturin hjá japansku Honda verksmiðjuni, er intelligentur og kan "næstan" tað sama sum menniskju - ella tað sum hann verður programmeraður til.

Asimo er kendur sum heimsins mest framkomni robottur. Asimo stendur fyri "Advanced Step in Innovative Mobility".

Herfyri var Asimo í Evropa-parlamentinum og heilsaði upp á limirnar har í sambandi við at parlamentið stuðlar menningini av robottum í verkætlanini "RobotCup".

Vitjanin var fingin í lag, fyri at vísa hvat vit kunnu vænta okkum innan elektronisku tøknina í framtíðini.

Asimo gekk m.a. upp og niður gjøgnum trappur, heilsaði upp á fólk og tosaði.

Í síni røðu í Evropa-parlamentinum segði dr. Koerner, stjóri fyri Honda Research, at teirra mál var at gera robottar, sum sunnu flyta seg eins og menniskju, virka saman við teimum og vera teimum til hjálp.




*Super intelligenti robotturin hjá Honda, Asimo, heilsaði herfyri upp á limirnar í Evropa-parlamentinum*